# Ferðslutrygd og trivnaður

JÓN KRAGESTEEN
dagligur leiðari
Ráðið fyri
Ferðslutrygd



**Mest avgerandi fyritreytin at røkka Nullhugsjónini er hugburður, sum setur menniskjað og trivnað í miðdepilin**

**Materiellur hugburður**
Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverk, í Degi og Viku 6. mars 2007: »Vit skulu hava ein óhappstíttleika, soleiðis at pengarnir geva mest fyribyrging. Tað er farligt at fólk føla seg tryggari enn hvat tað er, tí er tað betri, at tey føla seg ótryggari enn hvat tryggleikin er.«

Orðini eru søgd í sambandi við, at miðvingar ynskja at tálma ferðina á bilum, sum koyra ígjøgnum bygdina, soleiðis at tað verður tryggari og liviligari í bygdini. Men stjórin á Landsverki feiar alt av borðinum og sigur, at tað loysir seg ikki at brúka pening til at gera viðurskiftini tryggari í Miðvági. Hann fer enn tá so langt sum at siga nakað, sum ikki kann skiljast øðrvísi, enn at miðvingar skulu kenna seg ótryggar fyri at fáa ein atburð, sum ger at ansað verður betri eftir ferðsluni. Hvørjar avleiðingar tað fær fyri fólk, sum býr har, - 24 tímar um samdøgrið - sýnist ikki at hava áhuga. Tað at koma fram úr einum stað í annað skjótast gjørligt, tykist vera altavgerandi. Ferðslutrygdin og trivnaðurin hjá teimum, sum búgva har í millum, kemur í aðru rød.

**Menniskjaligi hugburðurin**
Justines K. Eliasen í Leirvík í sendingini »Bygdalív« 11. mars 2007: »Um ikki okkurt verður gjørt her skjótt, so følna menniskjuni her. Hetta er eitt minni samfelag og eg haldi, at tað er týdningarmikið at funnið eina loysn tíðliga at sloppið uttan um bygdina, soleiðis sum man er sloppin út um aðrar bygdir. Serliga útfrá smábørnum. Eitt barnalív er so stutt, og stendur hetta upp á í nógv ár afturat, so fer eitt barn sum er vaksið upp her bara at minnast trega trongd og forstýrilsir. Barndómsminnini eru so øgiliga viktig, tí at tey mynda menniskju. So fyrst og fremst fyri børnini vildi eg ynskt at ein loysn var funnin skjótast gjørligt. Tað er ein etiskur spurningur, um vit vilja gera tað trivnaðarpostivt fyri børn, fyri vaksin og ikki minst fyri gomul.”

**Fyridømið við SMS**
Flestu munnu minnast hvussu øll, hvussu skjótt bilarnir fyri nøkrum árum síðani koyrdu á R. C. Effersøesgøta fram við SMS í Havn. Vegurin hevði fýra farbreytir, tvær hvønn vegin og bygnaðurin meira ella minni legði upp til, at ferðin á bilunum bleiv í meira lagi. Fólk, sum skuldu yvir um vegin høvdu tað sera trupult. Tá ið eini 5 fólk vóru deyð av ferðsluvanlukku har, og býráðið í Havn hevði fingið fleiri áheitanir frá ymsum partum um at broyta vegin, hendi nakað. Her varð gjørd rundkoyring, miðoyggjar, og fólk til gongu fingu høvi at ganga yvirum vegin í tveimum. Miðoyggjarnar blivu enntá gjørdar soleiðis, at tær verja tann, sum er til gongu. Í dag koyra her um 10.000 bilar um samdøgrið og miðalferðin er um 35 km/t á teimum røttu strategisku støðunum. Og allarflestu munnu vera samd um, at ferðslan í dag gongur upp á stás í hesum øki.

**Kundi verið enn betri**
Hóast tað var upprunaliga ætlan býráðsins, so var tíverri ikki hildið fram við hesum skilagóða tiltaki longri uppi í R. C. Effersøesgøtu. Og her gongur sjón fyri søgn, her er miðalferðin 51 km/t og økið er eisini munandi ótryggari hjá fólki sum skulu yvir um vegin.



*Miðvingar eru sera misnøgdir við ferðslutrygdarviðurskiftini á landsvegnum, sum gongur gjøgnum bygdina*

**Landsvegir út um bygt øki**
Flestu munnu vera samd um, at tað er sera óheppið, at landsvegir ganga í gjøgnum bygdir. Men støðan er tann, at hetta tíverri er veruleiki í fleiri bygdum í Føroyum. Málið má sjálvsagt vera, at fáa hesar vegir lagdar út um bygt øki sum skjótast.

Men til tað er hent, mugu vit laga ferðsluna á hesum vegum, soleiðis, at hon er til minst ampa fyri fólkini, sum búgva í hesum bygdum. Fyrsta fyritreytin er, at ferðin á bilunum verður sett niður á teimum støðum, har fólk og bilar verða blandað saman. Og tað skal verða undirstrikað, at tað er ikki nóg mikið bara at seta skelti upp, tað er neyðugt at laga vegaumhvørvið soleiðis, at tað ikki skal bera til at koyra skjótari enn tilætlað, t.d. trongar, miðoyggjar, sving og um neyðugt: bungur.

**Spurningur um hugburð**
At gera ferðtálmandi tiltøk nýtist ikki altíð at vera kostnaðarmikið og alt nýtist ikki at vera gjørt í senn. Staðfestast má tí, at tá ið stjórin í Landsverk málber seg, sum hann ger, er tað tí, at hann hevur tann hugburð, sum hann hevur.

**Hví ber ikki til í Miðvági?**
...hví skal tað ikki lata seg gera at tálma ferðina á teimum 3000 bilunum, sum koyra ígjøgnum Miðvág, tá ið tað ber til í R. C. Effersøesgøtu, har 10.000 bilar koyra?

Hava teir 3.000 bilarnir meiri skund enn teir 10.000?

**48 sekund á muni**
Vegastrekkið millum hús í Miðvági er uml. 2 km. Um vit siga, at ferðtálmandi tiltøk vóru gjørd á ávísum strategiskum støðum í bygdini, soleiðis at ferðin fór niður í 30 km/t í helvtini av strekkinum, so vildi tað tikið 3 minuttir og 12 sekund at koyrt í gjøgnum bygdina í staðin fyri 2 minuttir og 24 sekund við 50 km/t allan vegin. Altso 48 sekund longri.

**Munurin millum 30 og 50...**
- er at eitt fólk doyr, sum verður árent av einum bili, sum koyrir við 50 km/t. Er ferðin hinvegin um 30 km/t er møguleikin nógv størri at komið verður frá tí við lívinum

Munurin millum 30 km/t og 50 km/t kann vera munurin millum trivnað og ótrivnað

**Borgarar taka ábyrgd á seg - og ikki minst, teir seta krøv!**
Alsamt fleiri og fleiri borgarar kring landið taka ábyrgd á seg og vilja gera sítt til fáa ferðsluna tryggari. Borgararnir í Miðvági eru bara eitt dømi um hetta, men vit kundu nevnt fleiri onnur dømi kring landið.

Fólk eru meira og meira vorðin tilvitað um týdningin at verja lívsvirði, sum eru altavgerandi fyri lívskvalitetin. Og tað er hetta, sum Nullhugsjónin er grundað á, og sum Justines K. Eliasen eisini vísur, at hann hevur skilt.

Tí er mest avgerandi fyritreytin fyri at røkka Nullhugsjónini at fáa

## FAKTA

Støð í landinum, sum hava umleið somu trupulleikar, sum Miðvágur hevur, eru t.d.: Sandavágur, Kollafjørður, Runavík, Gøtugjógv, Leirvík, Klaksvík, Havnin, Tvøroyri, og Vágur.

## Hvat samfelag vilja vit hava?

Hvat samfelag vilja vit hava?
- Vilja vit hava betong, asfalt og vegaumhvørvið, sum bara er lagað til bilarnar, sum fúka fram við - larmandi, spruttandi og osandi?
- Góðtaka vit, at bygdaløg og bygdir, býlingar og býir verða terroriserað av bilum? Har tú mestsum skalt lúra undan húsahornum ella parkeraðum bilum fyri ikki at verða yvirkoyrdur? Har vandar lúra frammanífrá, aftanífrá, frá síðunum...
- Góðtaka vit, at tað verður gjørt so lítið fyri tey, sum hóast alt, hætta sær til gongu?
- Góðtaka vit, at skula liva í støðugum ótta, hvørja ferð børnini fara út um hurðina?
- Góðtaka vit, at vit, orsakað av óttanum, mugu halda børn okkara inni, og at tey harvið mestsum bara verða víst til at fáa upplivingar gjøgnum teldu og sjónvarp?
- Góðtaka vit, at børn okkara skulu verða frátikin møguleikan at ganga ella súkkla í skúla, til frítíðarítriv o.a.? (foreldrini tora ikki annað, enn at koyra tey!)

**Ella**
- Vilja vit hava eitt samfelag, sum leggur upp til, at tú kanst fara til gongu, uttan alla tíðina at føla ótta á tær
- Vilja vit hava eitt trygt, friðarligt og hugnaligt umhvørvi, har bilar og fólk til gongu í minstan mun verða blandað saman?
- Har sum bilar og fólk verða blandað saman, t.d. tá ið farast skal yvirum vegin, verða gjørd trygg yvirgangsstøð, við týðiliga frámerktum gonguteigum, har m.a. bara ein farbreyt verður tikin í senn, og umstøðurnar eru lagaðar soleiðis, at tað ikki ber til at koyra skjótari enn tilætlað.

Í veruleikanum er hetta eisini ein heilsuligur spurningur, tí um vit ikki laga samfelag okkara soleiðis, at umstøðurnar leggja upp til, at vit hava møguleika at røra okkum meira, at vit t.d. ganga ella súkkla í skúla ella til arbeiðis, kemur tað okkum aftur um brekku.



*Eftir at fleiri fólk vóru deyð í ferðsluni í R. C. Effersøesgøtu í Havn, tók býráðið sær um reiggj og framdir ferðslutrygdarábøtur uttan fyri SMS.*